# ANNIKA VIL STJÓ KONGARÍKINUM

**POLITIKKUR** Hon gjørdist limur í Sosialistiska Fólkaflokkinum fyri trimum árum síðan, tí hon var misnøgd við Sosialdemokratarnar. Nú er hon í landsnevndini hjá flokkinum og bjóðar seg fram til komandi fólkatingsval við føroyskari fyrimynd



Uni Holm Johannesen

Villy Søvndal. Ida Auken. Ole Sohn. Kamal Qureshi. Holger K. Nielsen. Og Annika Smith.

Millum garvaðu og óroyndu valevnini hjá Sosialistiska Fólkaflokkinum er ein føroysk kvinna, sum vónar at fáa ávirkan á danskan landspolitikk í komandi valskeiði.

Fríggjadagin varð greitt, at føroyska Annika Smith verður á vallistanum hjá flokkinum, tá danir skulu velja fólkatingsumboðini av nýggjum komandi ár.

Hon verður uppstillað í Keypmannahavn, har hon millum annað skal kappast við Villy Søvndal, floksformannin, og Ida Auken, sum stóð seg væl við seinasta val, um atkvøðurnar.

34 ára gamli føroyingurin ræðist ikki avbjóðingina. Hon er bjartskygd og bjóðar seg fram við einum endamáli. At verða millum teir 179 fólkatingslimirnar, sum verða valdir.

- Tað er eingin orsøk at stilla upp, um tú ikki ætlar tær inn. Tað verður torført, men eg elti møguleikan. So nú fari eg undir fyrireikingarnar til valdystin, sum byrjar av álvara eftir summarfrítíðina, sigur Annika úr horninum í Keypmannahavn.

Hon er ein av 16, sum eru uppstillað fyri SF í Keypmannahavn. Annika sigur, at flokkurin væntar at fáa seks fólkatingsumboð úr danska høvuðsstaðarøkinum.

## Stríðist fyri rættvísi

Annika Smith hevur tørv á at ávirka samfelagið, sum hon býr í. Tað er einfalda orsøkin, at hon fer at bjóða hinum uppstillarunum av. Hennara uppgáva verður fyrst og fremst at sláa manngarð um tey, sum eru illa stødd. Hon vil verða røddin hjá narkomanum, skøkjum og øðrum árendum, samstundis sum hon fer at stríðast fyri sosialari javnvág, har arbeiði skal verða til allar hendur og øll hava javnbjóðis møguleikar og rættindi.

## LEINGIST

*- Mær leingist heim. Men flyti eg, so fari eg eisini at leingjast eftir gerandisdegnum í Danmark. Eg eri í eini tvístøðu, men sleppi eg inn í Fólkatingið, verði eg sjálvsagt verandi, sigur Annika Smith*

- Tað er mín greiða sannføring, at hvør einstakur skal hoyrast. Gjógvin millum rík og fátøk er ov stór í løtuni, og tað eru millum knútarnar, sum eg vil loysa. Eg stríðist í grundini fyri rættvísi, sigur hon.

Hennara politiski áhugi stavar frá, at hon hevur millum annað búð í Peru í Suðuramerika. Hon hevur sæð vantandi virðingina fyri fólkaræðinum og mannarættindum.

Annika hevur seinastu árini starvast sum politiskur ráðgevi í Norðuratlandsbólkinum. Hon arbeiddi eitt skifti fyri ST í New York, og hon hevur eisini arbeiðsroyndir úr ES-skipanini í Brussel.

## Vísti SD aftur

Aftaná at kríggið í Irak og Afganistan brast á, myndirnar av Mohammed og greiða høgravenda meirilutan í Danmark, hevði Annika sæð nógmikið. Hon tók blaðið frá munninum og ritaði seg inn í SF í 2007.

Sum ung var hon annars limur í DSU (Dansk Socialdemokratisk Ungdom). Men tá hon skuldi taka endaligu avgerðina, vísti hon flokkinum, sum seinastu 130 árini hevur stríðst fyri rættvísi, aftur. Sosialdemokratarnir høvdu eftir hennara tykki flutt seg ov nógv móti miðjuni.

Donsku fjølmiðlar hava seinastu mánaðirnar varpað ljós á, at Sosialistiski